# Íløgurøkt

Ert tú nøgdur/nøgd við rentuna á tínum innlánum, ella kundi tú hugsað tær eitt hægri avkast?
Hevur tú umhugsað íløgur í virðisbrøv, og ert tú sinnaður at taka eitt sindur av váða?

**Lat okkum røkja tínar íløgur**
Íløgur í virðisbrøv geva tær møguleika fyri hægri avkasti av tínari peningaogn, serliga nú vanligu innlánsrenturnar eru søguliga lágar. Men íløgur í virðisbrøv krevja tolni, eitt rímiliga langt íløgutíðarskeið, og at tú er til reiðar at átaka tær ein ávísan váða.

Vit hava ment eitt íløgukonsept, har tínar íløgur verða røktar av okkum. Gert tú eina avtalu við okkum um íløgurøkt, so inniber hetta m.a. at,

- Vit hava leypandi eftirlit við íløgunum
- Vit laga íløgurnar til títt íløgutíðarskeið
- Vit laga íløgurnar til tín váðaprofil
- Vit syrgja fyri stórari váðaspjaðing
- Tú fært fondsnotu, tá handlað verður
- Tú kanst fylgja við íløgunum í Netbankanum
- Tú fært hálvárliga kunning um, hvat íløgurnar kasta av sær

**Professionellur samstarvspartur**
Betri Markets hevur drúgvar royndir á virðisbræva–marknaðunum og í hesum sambandi eisini ognarrøkt. Royndirnar hava givið okkum servitan á økinum.

Henda servitan er grundalagið undir okkara førleika at røkja tínar íløgur. Vit tryggja, at tín peningur verður sendur til arbeiðis, og at íløgan verður eftirhugd og røktað á besta hátt fyri teg og í mun til tín váðaprofil og títt íløgutíðarskeið.

**Váði**
Tað er altíð ein ávísur váði tengdur at íløgum í virðisbrøv. Váðin er tó ymiskur á einstøku virðis-brævasløgunum. Partabrøv sveiggja t.d. meira í virði enn eitt nú lánsbrøv. Avkastið á virðisbrøvum kann tí í tíðarskeiðum verða negativt.
Váðin á tínum íløgum verður tillagaður tínum váðaprofili. Sæð yvir eitt longri tíðarskeið, kanst tú sum íleggjari vænta eitt hægri miðalavkast av tíni íløgu, samanborið við vanligar innlánsrentur. Men tú mást góðtaka, at virðið á uppsparingini sveiggjar í íløgutíðarskeiðnum.

**Okkara íløgutilgongd**

| Íløgutíðarskeið | Váðaprofilur | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Lágur | Miðal | Høgur | Høgur (uttan vanlig lánsbrøv) |
| 2 - 5 ár | Partabrøv 10 - 20%<br>Lánsbrøv 80-90% | Partabrøv 30 - 40%<br>Lánsbrøv 60-70% | Partabrøv 50 - 60%<br>Lánsbrøv 40-50% | Partabrøv 80%<br>Lánsbrøv 20% |
| 5 - 10 ár | Partabrøv 30 - 40%<br>Lánsbrøv 60-70% | Partabrøv 50 - 60%<br>Lánsbrøv 40-50% | Partabrøv 60 - 70%<br>Lánsbrøv 30-40% | Partabrøv 85%<br>Lánsbrøv 15% |
| Yvur 10 ár | Partabrøv 40 - 50%<br>Lánsbrøv 50-60% | Partabrøv 60 - 70%<br>Lánsbrøv 30-40% | Partabrøv 70 - 80%<br>Lánsbrøv 20-30% | Partabrøv 90%<br>Lánsbrøv 10% |

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
banki@betri.fo
www.betri.fo